gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Fleiri til Danmarkar



**Herda prískappingin førdi við sær, at fleiri fólk valdu at ferðast loftvegis í fjør enn undanfarin ár. Tað gav Atlantsflogi umleið 8.000 ferðafólk fleiri í fjør enn í fyraárið**

FLOFGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Í viðmerkingunum til roknskapin hjá Atlantsflogi sigur nevndin, at felagið hevði ein vøkstur upp á 7% í ferðafólkatalinum í fjør í mun til 1999. Størsti vøksturin var á Danmarkarrutuni, meðan eisini fleiri ferðafólk vóru á Skotlands- og Noregsrutuni.

Hinvegin var slakari á rutuni millum Aberdeen og København og á Íslandsrutuni.

Avtalan, sum Atlantsflog hevur havt við Air Iceland um flúgving millum Ísland og Grønland, er søgd upp, tí rutan er fyribils niðurløgd. So tann inntøkan verður ikki í ár, verður sagt í viðmerkingunum.

Men eisini tyrluflúgvingin var væl lívligari enn árið fyri. Her var ferðafólkavøksturin upp á heili 10%. Men tað nyttaði tó so lítið, tí hendan flúgvingin gav eitt rakstrarhall.

Atlantsflog økti flotan við 100% í fjør, tá nýtt flogfar av sama slagi sum tað, felagið hevði frammanundan, varð keypt. Flogfarið var í rutuflúgving hjá Atlantsflogi seinasta summar, og hevur síðan verið leigað út, men kemur aftur í summar.

# Atlantsflog havt aðalfund

**Roknskapurin vísir eitt úrslit upp á 10 milliónir krónur áðrenn skatt. Eginpeningurin er øktur frá knøppum 65 milliónum til góðar 87 milliónir**

FLOGFERÐSLA
*Jákup Mørk*
*Edvard Joensen*

Roknskapurin hjá Atlantsflogi vísir eitt avlop upp á 9,4 milliónir eftir skatt. Hetta er heldur betri úrslit enn í fjør, tá tað var 8,1 mill.

Eginognin hjá felagnum vaks úr knøppum 65 milliónum til góðar 87 milliónir, og tað er nevndin nøgd við. Í hesi øking er íroknaður ein vøkstur upp á 13 milliónir, sum er íkomin av broyttum roknskaparhátti viðvíkjandi avsetingum til viðlíkahald. Í viðmerkingunum til roknskapin sigur nevndin, at hendan broyting er í samsvar við altjóða og nýggjar danska roknskaparhættir.

Nevndarformaðurin, Eyðfinnur Jacobsen, hevur lagt frá sær, og Christian Andreasen, advokatur er nývaldur í nevndini. Nevndin skipar seg sjálv.

Í stuttari viðmerking sigur Magni Arge, stjóri, at hann er hampiliga væl nøgdur við úrslitið.

– Eg vil siga, at tekur tú atlit til at útreiðslurnar eru øktar einar 10 milliónir krónur orsakað av høgu olju og dollaraprísunum, samstundis sum kappingin á Danmarkarrutuni er harðnað, haldi eg okkum vera komin rímiliga væl burtur úr árinum.

Víðari sigur Magni Arge, at eitt nú Air Iceland og Grønlandsfly hava havt munandi hall í ár 2000. Hetta eru feløg, sum Atlantsflog ofta verður samanborið við.

– Eg vil tó leggja aftrat, at ambitiónirnar so avgjørt eru til eitt enn betri úrslit. Tað eru tó ymsir faktorar, sum vit ikki sjálvi kunnu ávirka. Viðhvørt spæla hesir við og viðhvørt ímóti, og í fjør vóru hesir so avgjørt ímóti. At úrslitið hóast hetta er positivt, sýnir, at grundraksturin í felagnum er í lagi, og tað hava vit so avgjørt orsøk til at fegnast um.



*Magni Arge, stjóri, handaði Eyðfinni Jacobsen, fráfarandi nevndarformanni, ein málning eftir aðalfundin í gjár*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




# Atlantsflog á partabrævamarknað

**Nevndin í felagnum er nú farin undir fyrireikingar at skráseta føroyska flogfelagið á einum møguligum føroyskum partabrævamarknaði**

VIRÐISBRØV
*Jákup Mørk*

Í frágreiðingini til ársroknskapin hjá Atlantsflog fyri 2000 stendur, at nevnd felagsins hevur gjørt av at fara undir fyrireikingar til skráseting á einum komandi føroyskum virðisbrævamarknaði.

Magni Arge, stjóri, sigur í viðmerking til hetta, at enn er langt eftir á mál í hesum fyrireikingum.

- Vit hava als ikki sett okkum nakað mál fyri, nær hetta arbeiði skal verða liðugt. Hetta er eitt arbeiði, sum skal gerast ordiliga, og tí er umráðandi, at vit lata hetta taka ta tíð, sum tað krevur. Tað ringasta, sum vit kunnu gera, er at skunda málið ígjøgnum, tí tá kann tað gera størri skaða enn gagn.

Magni Arge sigur annars, at eitt av endamálunum við eini skráseting á einum partabrævamarknaði, er at felagið tá hevur møguleika at styrkja um kapitalgrundarlagið. Eitt nú í samband við eini endurnýggjan. Tá er tað av alstórum týdningi, at samsvar er ímillum fíggjarligu orku felagsins, lánibyrðu og eginfígging av møguligum nýíløgum.

## Positivan eginpening

Roknskapur felagsins fyri 2000 er annars hin fyrsti, har samlaði eginpeningurin er størri enn nominelli partapeningurin. Mett hevur verið, at hetta er ein avgerandi fortreyt fyri eini møguligari skráseting á partabrævamarknaði, men enn tykist als ikki at vera nakað tos um at útlutað vinningsbýti kortini.

- Eg vil ikki siga, at eginpeningur felagsins er ov lítil. Tað veldst um m.a. hvussu stóran solvenstørv vit hava. Hinvegin meta vit tað í løtuni vera skilagott at flyta yvirskotið óskert til eginognina, soleiðis at felagið kann konsoliderast enn meira, sigur stjóri felagins.

Hann leggur afturat, at enn hevur felagið einki mál sett sær fyri, hvussu stór eginognin skal verða, áðrenn ein møgulig útlutan kemur upp á tal, men ásannar samstundis, at hetta sjálvandi er nakað, sum møguligir innskjótarar taka atlit til, tá og um ein skráseting á einum partabrævamarknaði gerst veruleiki.




gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Óvissa um farleiðina út í Hest

**Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at hann umhugsar at bjóða Hestleiðina út til privat at taka sær av, til Teistin verður settur aftur í sigling. Sam røkir hesa siglingina nú, men tað verður kanska ikki leingi afturat**

STRANDFERÐSLAN
*Stefan í Skorini*



*Tá sáttmálaviðurskiftini hjá manningini umborð á Teistanum eru fingin í rættlag, skal Strandferðslan finna eitt skip at røkja farleiðina út í Hest*

Sandoyingar og Hestfólk hava sagt Tróndi farvæl og boðið Teistanum vælkomnum. Tó er tað Sam, ið førir fólk um Skopunar- og Hestfjørð. Orsøkin er, at sáttmálaviðurskiftini hjá manningini umborð á Teistanum ikki eru fingin í rættlag enn. Striltið gongst við hesum, skilst á lagnum.

Inntil Teistin verður settur í sigling, røkir Sam hesa farleiðina. Tað verður tó ikki møguligt hjá Teistanum at leggja at í Hesti, fyrr enn umbyggingin av havnalagnum á staðnum er liðug. Hetta verður væntandi ikki fyrr enn einaferð í heyst. Tí skal ein avloysari finnast.

## Bjóða Hestleiðina út

Fólk í Hesti hava víst sína ónøgd við, at ein lítil bátur, ið er 26 føtur varð settur at røkja siglingina út í Hest. Tey vístu á, at báturin ikki hevði megnað at røkt farleiðina á ein nøktandi hátt. Henda ætlanin er nú løgd til viks.

Nú siglir Sam so út í Hest, men tá sáttmáli verður undirskrivaður millum lønardeildina á fíggjarmálastýrinum øðrumegin og Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið hinumegin skal Teistin sigla ímillum Skopun og Gomlurætt. Tá skal Reidar Nónfjall finna ein bát at sigla út í Hest, og tað verður ikki Sam, tí er ein ov dýr loysn.

– Vit arbeiða við øðrum loysnum nú, og ætlanin er at lýsa í bløðunum eftir fólki, ið hava áhuga í at røkja siglingina út í Hest hesar fýra næstu mánaðirnar. Trupulleikin hjá okkum er at finna eitt hóskandi skip, sigur Reidar Nónfjall.

Tað verður so onkur privatur, ið verður settur at røkja farleiðina, tí strandferðslan hevur einki skip til taks. Reidar sigur seg hava onkrar møguleikar at loysa trupulleikan, men tað eru oftast loysnir, hann ikki er nøgdir við.

– Tað er ikki altíð so lætt at finna nøktandi loysnir til hesar farleiðirnar. Skipini kunnu ikki bara setast inn her og har, tí tey skulu passa. Eitt er krøvini frá skipaeftirlitinum, og so skulu tey eisini passa til havnalagið á staðnum, sigur Reidar.

Reidar lýsir støðuna sum ein línudans, har strandferðslan skal javnviga á línuni. Hann vísir á, at lappaloysnirnar eru sera kostnaðarmiklar. Harafturat kunnu vinnulívið og fólkið á staðnum ikki liva við lappaloysnum.



*Reidar Nónfjall umhugsar at lata onkran privatan røkja siglingina út í Hest í eina tíð*

# Útflutningurin meiri enn skrivað

**Ein meting hjá Havbúnaðarfelagnum sigur, at útflutningsvirðið av laksi og síli liggur ímillum 800 og 900 milliónir krónur, og ikki 667 milliónir, sum skrivað varð týsdagin**

ÚTFLUTNINGUR
*Stefan í Skorini*



*Útflutningsvirðið av síli og laksi liggur ímillum 800 og 900 milliónir krónur*

Í blaðgrein týsdagin stóð skrivað, at útflutningurin av laksi og síli var 667 milliónir krónur. Regin Jacobsen á Bakkafrost hevur gjørt vart við, at hetta talið er nakað væl hægri.

Orsøkin til mistakið er, at talvurnar í Hagtíðindum, haðani tølini eru fingin, eru misvísandi í hesum førinum. Undir útflutninginum av laksi og síli eru lidnar vørur frá hesum báðum fiskasløgum ikki tikin við. Hetta hevur við sær, at útflutningsvirðið av laksi og síli er ov lágt, sum tað stendur í Hagtíðindum.

Fýra virkir eru í Føroyum, ið framleiða lidnar vørur úr laksi, so tað hevur stóran ávirkan, at útflutningurin frá hesum virkjum ikki verður taldur uppí útflutningin av laksi og síli.

Regin Jacobsen sigur seg hava víst á hesar misvísandi upplýsingarnar fleiri ferðir fyrr, men eingin broyting er hend, og tí verður útflutningsvirðið í Hagtíðindum nakað lægri enn í veruleikanum.

Tølini fyri útflutning, sum Havbúnaðarfelagið savnar saman vísa, at útflutningurin av sílum var 1.060 tons og 28.250 tons av laksi. Í Hagtíðindum stendur 24.105 tons, sum eisini er heldur misvísandi, vísir Regin Jacobsen á.

# Útflutningurin tvífaldaður

**Fýra teir fyrstu mánaðirnar í ár útfluttu alarar í Føroyum nærum tvífalt so nógv sum fyrstu fýra mánaðirnar í fjør**

ÚTFLUTNINGUR
*Stefan í Skorini*

Fyrstu sekstan vikurnar í hesum árinum hava alarar selt 13.379 tons av landinum, og tað er eitt útflutningsvirðið uppá 347 milliónir krónur.

Somu tíð í fjør høvdu alarar bara selt 7.747 tons av landinum, og tað er eitt útflutningsvirðið uppá 209 milliónir krónur.

Meðalprísurin í ár er 26 krónur fyri kg, meðan meðalprísurin í fjør var 27 krónur fyri kg.

Hetta vísa tøl frá Havbúnaðarfelagnum. Hvørja viku senda øll kryvjivirkini í landinum eina uppgerð til felagið, sum telur saman.

Staðfestast kann, at útflutningurin er øktur munandi í mun til í fjør. Regin Jacobsen roknar við, at hesin vøkstur fer at halda sær í hesum árinum.

Árin frá ILA-sjúkuni merkjast ikki enn, men fara kanska at síggjast aftur í útflutningstølunum næsta ár ella seinni.

Mynd: Útflutningurin fýra teir fyrstu mánaðirnar í ár er nærum tvífaldaður í tonsatali samanborið við fýra teir fyrstu mánaðirnar í fjør

# Sinnisbati á Hafnia

**Leygardagin tann 5. mai hevur felagið Sinnisbati aðalfund á Hotel Hafnia. Tvær sjúkrasystrar fara tá eisini at nýta høvi til at halda nakrir Fundurin er almennur, og øll eru vælkomin á fund, eisini tey ið ikki eru limir**

*Annika Bech*

Tað eru sjúkrasystrarnar Johanna Andreassen og Oddbjørg Johannesen sum fara at hava fyrilestrar um ein nógv umrøddan og gagnligan viðgerðarhátt, nevndur »kognitiv terapi«.

## Felagið økt munandi

Felagið Sinnisbati er økt munandi síðani síðsta ár.

Sjálvi halda tey, at tann størsta orsøkin óviað er, at fjølmiðlar teirra hava víst teimum psykisk sjúku stóran ans. Í november í fjør, varð ein pallborðsfundur útvarpaður beinleiðis yvir Rás2, og tað hevur heilt víst eisini gjørt sín part í, at fólk eru byrjaði at lata eyguni upp fyri felagnum og givið teimum gætur.

Sinnisbati hevði eina fyrilestrar viku í læraraskúlanum. Tað savnaði nógv fólk, og er klárt eisini ein stór orsøk til at áhugin fyri felagnum er øktur so nógv.

Felagið er sera takksamt fyri fyrilestrarnir ið vóru hildnir tá, tí teir vóru sera áhugaverdir og komu nógvum menniskjum til góðar.